the Faroe Islands




## UPPSETING AV

# GONGUTÚRA-SKELTUM

## » GONGUTÚRASKELTIÐ FEST Á GRÓT

Er ein stórur steinur á leiðini, har gongutúrurin byrjar, kann skeltið festast á steinin. Skeltið skal vera sjónligt.

**! Ansa eftir, at skrúvurnar ikki raka tekstin á skeltinum.**











**1**

Finn ein stein, sum er nøkulunda flatur.

**2**

Fest skeltið væl sbrt. punkt 3. Skeltið skal í minsta lagi vera 30 cm upp frá jørðini.

**3**

**1.** Skeltið skal festast á eina plátu.
**2.** Brúka ein stóran bolt við møttriki og skivu at festa plátuna í steinin.
**3.** Anchorfix skúm skal brúkast fyri at festa boltin í steinin.

» GONGUTÚRASKELTIÐ FEST Á VEGG ELLA GARÐ

Skeltið kann festast á ein vegg ella ein garð, um eitt portur er við síðurnar av.

**! Ansa eftir, at skrúvurnar ikki raka tekstin á skeltinum.**



1

Finn eina sjónligan vegg ella garð, har gongutúrurin byrjar.




í mesta lagi
170 cm

2

Skeltið skal festast væl á veggin ella garðin við síðuna av portrinum.

## » GONGUTÚRASKELTIÐ FEST Á SERGJØRDA RAMMU

Um eingin steinur, garður ella veggur er, har skeltið skal setast, so kann ein aluminiumsramma, ið er sergjørd til høvið, brúkast. Ramman fæst við at venda sær til Visit Faroe Islands.










**1**

Hetta er ramman.

**2**

Skeltið skal skrúvast fast ovast við.

**3**

Fyri at ramman skal vera stútt, skal hon festast í undirlagið, ella grót leggjast á. Ramman skal fjalast við gróti ella bøkkum, so hon fellur væl inn í umhvørvið.